BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Verkætlanarleiðari til Barna- og útbúgvingarmálaráðið

**Avbjóðandi og spennandi starv  sum verkætlanarleiðari í Barna- og útbúgvingarmálaráðum er leyst at søkja**

**Starvið**
Eitt spennandi starv sum verkætlanarleiðari í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum er leyst at søkja til setanar tann 1. apríl 2023. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 31. mars 2024 við møguleika fyri longdari setan.

Verkætlanarleiðarin skal skipa og leiða verkætlan at samskipa tvørgeiraligu tilgongd innan barna- og ungdómsøkið, har málið er at laga niður forðingar, sum kunnu verða millum ymsu skipanirnar og geirarnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur til børn og ung. Barna- og útbúgvingarmálaráðið stendur fyri verkætlan, sum skal fáa til vegar grundarlag fyri at taka samskipaðar politiskar avgerðir á barna- og ungdómsøkinum.

**Visiónin**
Visiónin er, at Føroyar skulu verða tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Øll børn og ung skulu hava tryggar og góðar karmar, sum tey mennast og mentast í, til tess at tey blíva heil menniskju, sum kunnu virka í einum rúmligum demokratiskum samfelagi, har øll trívast. Fyribyrgjandi átøk eru partar av hesum.

Børn- og ung, sum hava tørv á hjálp og stuðli fyri at hava viðburð, skulu fáa tær neyðugu veitingarnar og tænasturnar so tíðliga og munadygt sum møguligt. Ein skilagóð fyriskipan skal tryggja sameining og samskipan av fjølbroyttum tænastum, sum ymsir geirar og stovnar veita, soleiðis at hesir samvirka til tess at veita eina so góða tænastu sum møguligt.

**Uppgávurnar**
Uppgávurnar hjá verkætlanarleiðaranum eru m.a.:

- Virka við til at skipa og lýsa grundarlagið fyri verkætlanini saman við øllum viðkomandi pørtum.
- Leiða tilgongdina at greina innihaldið og samanhangin millum ymsu skipanirnar, sum viðvíkja børnum og ungum saman við pørtunum.
- Standa fyri, at uppskot verða orðað, sum fyrireika, hvørjar møguligar loysnir kunnu verða á avbjóðingunum. Talan kann m.a. verða um bygnaðarlig átøk og samskipandi lóggávu.

Talan er um starv í einum spennandi organisatoriskum og politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti.

Høvuðsuppgávan í einum stjórnarráði er politisk menning og umsiting, sum er at veita tænastur til landsstýrisfólkið og tryggja, at málsøkið sum heild verður umsitið á fullgóðan hátt. Verkætlanarleiðarin kemur at luttaka í hesum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi hægri útbúgving so sum búskaparfrøðingur, samfelagsfrøðingur ella løgfrøðingur, vera skipað/ur og duga væl at orða seg á føroyskum og donskum, bæði í skrift og talu. Fyrimunur er at hava innlit og royndir frá verkætlanarleiðslu.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, umframt at arbeiða í verkætlanartoymi og arbeiðsbólkum. Tú skalt vera tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika skjótt at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Tú skalt hava góð analytisk evni umframt politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum í síni heild eins og førleikar í fremmandamáli, serliga enskum.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við eini týdningarmiklari avbjóðing og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, stjórnarráðini og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við telduposti til: bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 13. mars 2023**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010, ella t-post PoulGeertH@bumr.fo.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið*** *fyrisitur høvuðsmálsøkini barnavernd, barnaheilsu, dagstovnaøkið, útbúgving og gransking. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*